# Konfirmatiónir pálmasunnudag

## Havnar kirkja

Ata Maria Jensen, Brøttubrekku 14
Ása úr Dímun, Trapputún 16
Birita Lilja Simonsen, Smærugøtu 16 B
Durita Hansen, Kristiansgøtu 5
Fríða Hentze Magnussen, Tórgarðsgøtu 5
Gunnvá Brockie, Børkugøtu 11
Lisa Randi í Dali, Tórsbyrgi 3
Rannvá Daisy Danielsen, Javnagøtu 5
Rannvá undir Kletti, Í Svanga 10
Andreas Pauli Poulsen, Berjabrekku 105
Bjarni Werner Zachariassen, Kristiansgøtu 7
Brian Vang Poulsen, Birnugøtu 13
Børge Persson, Marinargøtu 22
Eli Hultgren, Brobbersgøtu 8
Hans Arni Bjarnason Thomsen, Hvítanesvegi 43
Hjalti Mohr Jacobsen, Berjabrekku 91
Kristian Gustafson, Smærugøtu 20
Peter Ritter, Fútalág 3
Rói Bjarnason Poulsen, Lützenstrøð 11
Sjúrður Simonsen, Kristiansgøtu 14
Sylvi Hansen, Millum Gilja 42
Tróndur Herason Olsen, Gróthúsvegi 11

## Vesturkirkjan

Fróði Kristiansson Dahl, Villingardalsvegi 55
Bjarni Enghamar, Landavegi 77
Emil Nolsøe Leifsson, Hetlandsvegi 3
Hallur Eyðfinnson Jacobsen, Dánjalstrøð 1
Jákup Mortensen, Faksagøtu 12
John Martin Bisp Winther, Heygsvegi 29
Jógvan Sigvald Lydersen Jacobsen, Dalagøtu 20
Jógvan Sólheim Heinesen, Niðaragøtu 7
Niels Arge Hammer, Skemmingsgøtu 20
Pauli Reinert Poulsen, Noregsvegi 11
Páll Gazet Patursson, Kirkjubø
Páll Mohr Joensen, Grønlandsvegi 49
Remi Olsen, Viðargøtu 11, Argjum
Sigtór Lützen, Syðradali
Símun Nolsø, Varðabyrgi 30
Suni Roel Joensen, Garðsgøtu 25 b, Argjum
Svenn Fuglø Jacobsen, Reyðagøtu 1
Teitur Augustinussen, Millum Gilja 149
Thor Rafnason, Noregsvegi 1
Tummas Eivin Kruse, Vesturgøtu 20
Anna Andrésen, Heiðagøtu 13, Argjum
Anna Maria Árnafjall, Velbastaðvegi 4
Fríðgerð Mirjam Stakkslíð, Fjalsgøtu 28
Rannvá H. Augustinussen, Varðabyrgi 32
Beinta Laksá, Argjavegi 57, Argjum
Bjørg Dam, Suðurstíggjur 1, Argjum

## Hósvíkar kirkja

Úr Hósvík:
Ása Hammershaimb Christiansen
Rógvi Klæmint Djurhuus Clementsen
Heri Djurhuus
Hans Petur Hansen
Herman Bogi Jatvarðsson Hermansen
Maibritt Mortensen
Elsa Maria Magnusardóttir Olsen
Úr Hvalvík:
Páll Hansen
Elisabeth Durhild Jacobsen
Jákubina Maria Jacobsen
Walther Olsen
Úr Streymnesi:
Elisa Abrahamsen
Birita Maria Joensen
Úr Saksun:
Marita Svartá
Av Langasandi
Heidi Højsted Hansen
Jóhanna Maria Hansen
Úr Tjørnuvík:
Dagmar Andreasen

## Vestmanna kirkja

Bjarni Jógvansson Durhuus
Niels Kristian Lisberg Mikkelsen
Dánial Jákup Baldur Matras Toftum
Tórunn Andreasen
Margit Durhuus
Rúna Durhuus
Maud Egholm
Annika á Heygum
Siri Joensen
Torgunn Herlufsdóttir Johansen
Emma Poulsen
Tordis Kristina á Rógvi Simonsen
øll úr Vestmanna

## Húsa kirkja

Erling J. Arntsen, Mikladalur
Louisa P. Jacobsen, Torvgøta 18, Klaksvík (Syðradalur)
Helgi Juul Petersen, Húsar
Petur Petersen,Syðradalur

## Klaksvíkar kirkja

Alvin Ellebye Andersen, undir Fossum 66, Klaksvík
Steynir F. Andreasen, Skúlavegi 9, Klaksv.
Regin Anthoniussen, Stoksoyrarvegur 43, Klaksvík
Jón Hansen, Norðoyri
Símun Heimustovu, undir Hæddini 4, Klaksvík
Eyðfinn Jacobsen, Haraldssun
Jón Jacobsen, Gravarbø, Klaksvík
Ólavur Jacobsen, á Brekku 8, Klaksvík
Bernhard Brim Joensen, Rættargøtu 7, Klaksvík
Jóhan Mikkjalsson Joensen, Garðsendi 23, Klaksvík
Magnus Joensen, undir Fossum 32, Klaksvík
Poul Nolsøe K. Linklett (Nølli), Heygavegi 54, Klaksvík
Heri S. Nolsøe, undir Brúnni 35, Klaksvík
Rógvi á Tjaldrafløtti Olsen, Uppsalagøtu 54, Klaksvík
Bjarti Ryan Petersen, Víkavegi 38, Klaksv.
Klávus Sólheyg, Nýggivegur 6, Klaksvík
Allan Gullbrandsson Tungá, undir Brúnni 42, Klaksvík
Jóannes Poulsson N. Viðbjørg, Bumshamarsvegi 30, Klaksvík
Biretha V. Joensen, undir Hálsi 57, Klaksvík
Sunnvør Olsen, undir Hálsi 7, Klaksvík
Ågot P. Sivertsen, Uppsalagøtu 13, Klaksvík
Maria Kristina Smith, Bøgøtu 15, Klaksvík
Óluva Venned, Skúlavegi 15, Klaksvík

## Leirvíkar kirkja

Ketty Ellingsgaard Petersen, Fuglafirði
Rebekka Abrahamsen, Fuglafirði
Maiken Joensen, Fuglafirði
Tóra Nolsøe Olsen, Fuglafirði
Alex Beck, Fuglafirði
Linda Eliassen, Leirvík
Christian Andreasen, Leirvík
Kim Joensen, Leirvík
Albert Joensen, Leirvík
Esther Maria Boyden Joensen, Leirvík
Hjalti Dan Kristmannsson, Leirvík
Jan á Líðarenda, Norðragøtu
Símun Louis Jacobsen, Syðrugøtu
Sverri Jacobsen, Syðrugøtu
Birna Jacobsen, Syðrugøtu
Martin Emil Hansen, Funningsfirði
Katrine Einestrand Kjeld, Funningsfirði

## Tvøroyrar kirkja

Allan Bjærge Poulsen, Froðba
Dennis Heðin Bjarnason Kjærbo, Tvøroyri
Eyðun Fríði Hammershaimb Nielsen, Fámjin
Jens Arne Hammerfoss Leo, Froðba
Teresa Hentze, Trongisvági
Mariann Mohr Mortensen, Trongisvági
Monica Farstad, Sevmýri
Annika Vang, Sevmýri
Diana Nygaard, á Torvheyggi



## Blómuárið 2000

Býargartnarin í Klaksvík hevur gjørt sítt til at halda merkisárið 2000.

Hann hevur sett 2000 leykir niður í grøna økið uttanfyri KÍ-høllina í Klaksvík, og blomstrini, sum hava skapið 2000, eru nú við at koma fyri seg.

KÍ hevði eitt gott ár í fjør, tá besta mansliðið í fótbólti vann bæði landskappingina og steypakappingina.

Ár 2000 verður hildin uttan fyri KÍ-høllina, og so er spurningurin um KÍ ætlar at halda árið inn á vøllinum eisini...

## Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúli 25 ár

*Í 1975 hevði Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúi fyrstu ferð framsýning av handaligum næmingaavrikum. Henda framsýningin var í Kommunuskúlanum*

Árið eftir og nøkur fá ár fram varð framsýning hildin á Læraraskúlanum, men skjótt gjørdist greitt, at rúmligari høli kravdust, um alt skuldi sýnast fram. Tí varð framsýningin flutt til tann tá nýggja Eysturskúlan, sum er munandi betur egnaður til hetta endamálið.

Í 1975 verður Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúli stovnaður í tí líki, hann hevur nú.

Tó var kvøldskúli hildin bæði í Havn og aðrastaðni í landinum fyri 1975. Tá fleiri søktu gjøgnum kommunurnar skúlamyndugleikarnar um góðkenning eftir lógini frá 11. mai 1935 um »Tilskud fra Staten og Skolefondene til Ungdomsskoler og Aftenskoler«. Nýggj føroysk lóg um frítíðarundirvísing v.m. kom í juni 1983 og henda lógin virkar óbroytt enn.

25. framsýningin verður sett leygardagin 15. apríl 2000 kl. 14.00 á Eysturskúlanum av Leivur Hansen borgarstjóra og er opin leygardagin til kl. 19. Pálmasunnudag 16. apríl er framsýningin opin millum kl. 14 og 19.

Á framsýningini verður eisini sangur og tónleikur at hoyra. Hesar báðar dagarnar hevur Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúli eisini framsýning í Veviskúlanum í Gamla Reinsarínum í Tórsgøtu 5.

## Fyribils úrslit frá merkingarroyndum í 1998

Petur Steingrund,
Fiskirannsóknarstovan

*Partur 1 av 7: Toskur merkt ur á Mýlingsgrunninum*

Í oktober 1998 vórðu 600 toskar merktir á Mýlingsgrunninum. Mynd 1 vísir, hvar toskarnir vórðu merktir (grátt øki) og hvar teir vórðu fingnir aftur (svartir prikkar) tað fyrsta árið (frá oktober 1998 til september 1999). Tað sæst týðuliga, at sum heild er toskurin sera støðufastur. Ein orsøk kann vera, at toskurin var smáur (55 — 65 cm) og tí ikke enn var farin at ferðast í sama mun, sum stórur toskur vanliga ger.




Mynd 1. Toskar fingnir aftur frá oktober 1998 til september 1999.

Um ein býtir hetta árið upp í smærri tíðarskeið, kemur fram, at toskurin fyrstu tveir mánaðirnar helt seg í sama umráði, har hann var merktur. Men í tíðarskeiðnum januar — mars (vanlig gýtingartíð) ferðaðust summir toskar meir, og tað var eystureftir (tríggir teir eystastu toskarnir). Í tíðarskeiðnum apríl — juni vóru teir aftur bert fingnir á Mýlingsgrunninum.

Um tygum hava fiskamerkir liggjandi, er sera týdningarmikið at senda tey til Fiskirannsóknarstovuna við upplýsingum um **innsendara**, **positión** og **fiskidato**. Eisini er gott at vita skip og upplýsingar um fiskin, so sum longd og vekt. Vit gjalda eyka fyri at fáa **fiskin** sendan til Fiskirannsóknarstovuna. Undir øllum umstøðum eru tygum vælkomin at senda tey fiskamerkir, tygum hava, við teimum upplýsingum, sum tygum nú einaferð hava. Tygum kundu jú vunnið í **lutakastinum** um 10000 kr, sum verður í september 2000. Í 1998 var vinnarin úr Klaksvík og í 1999 úr Hvannasundi.



*Jóannes Eidesgaard, form. Javnaðarfloksins:*

# Leggur stóran dent á økismenning



Spurningurin um útjaðaran og um økismenning er av og á frammi í kjakinum. Sosialurin fer at royna at viðgera hetta stóra mál meira miðvíst, og leggja vit fyri í dag við viðtali, sum Tummas í Dali hevur gjørt. Vit vilja eisini heita á lesararnar um at skriva um hetta evnið og annars siga sína hugsan. Sendið tilfarið til okkara ella ringið.

Tummas í Dali

Økismenning stendur rættiliga ovarlaga á politiska breddanum hjá Javnaðarflokkinum í hesum tíðum, sigur formaður floksins, Jóannes Eidesgaard.

Og við økismenning verður hugsað um, at økini uttan fyri høvuðsstaðin verða eins framkomin og nútímans í umsiting, tænastum og størvum annars sum høvuðsstaðurin.

Jóannes Eidesgaard frøist um, at í dag eru alt fleiri politikarar, sum viðurkenna trupulleikan, sum útjaðarin er í, men hann sigur seg tó verða noyddan at staðfesta, at politikkurin hjá sitandi samgongu hevur ikki broytt óhepnu gongdina.

### Markanaðarkreftir og økismenning

Harafturímóti óttast hann, at politisku ætlanirnar hjá sitandi samgongu fara at gera støðuna í útjaðaranum verri.

- Tað letur til, at í framtíðini verða tað bert markanaðarkreftirnar, sum ráða fyri, hvar tað vinnuliga virksemið skal vera, sigur Jóannes Eidesgaard.

- Vit síggja tað í sambandi við endurnýggjanina av fiskiskipaflotanum, og serliga týðiliga síggja vit tað í tí ætlaða óavmarkaða handlinum við veiðikvotum.

- Hesin politikkurin førir til, at veiðirættindini verða savnað, har kapitalurin er sterkastur, og tað er einki at ivast í, at tað er kring miðstaðarøkið, at tað verður, sigur hann.

### Ísland — ongin fyrimynd í so máta

- Tað, sum krevst fyri at økja um virksemið í útjaðaranum, er, at politikarar síggja landið sum eina heild, síggja landið sum eitt ábyrgdarøki, uttan mun til hvar teir eru valdir.

- Vit kundu - eins og íslendingar hava gjørt — í allar mátar góðtikið eina savnan av virkseminum á einum stað — í teirra føri er tað í Reykjavík.

- Liberalistiski politikkurin í Íslandi hevur viðført, at markanaðarkreftirnar hava stýrt gongdini soleiðis, at útjaðarin er avtoftaður í stórum.

- Handan gongdin er eitt úrslit av tí valinum, sum íslendingar hava gjørt, men henni stríðast vit so avgjørt ímóti her í Føroyum, sigur Jóannes Eidesgaard.

- Ongin eigur at misskilja viðgerðina av útjaðaranum soleiðis, at Tórshavn ikki framvegis skal vera høvuðsstaður.

- Sjálvandi skal Tórshavn vera høvuðsstaðurin við teimum uppgávum, sum hoyra høvuðsstaðnum og miðfyrisitingini til.

- Tað, sum er átrokandi, leggur Jóannes Eidesgaard dent á, er, at vit fáa sett mark millum tað, sum sjálvandi skal liggja í Tórshavn, og tað, sum natúrliga og uttan trupulleikar kann liggja uttanfyri.

### Tíðirnar broytast

- Tað hevur altíð verið soleiðis — eisini hjá okkum í Føroyum — at fólk flyta til støð, har livilíkindini eru betur, fremst av øllum har arbeiði er.

- Tað var tann tíð, tá fólk í hópatali fluttu til Suðuroyar, serliga til Vágs og Tvøroyrar, tí har var arbeiði at fáa.

- Men tíðirnar broytast, og gongdin seinastu árini hevur verið, at tað nú er arbeiði í almennu umsitingini og í tænastuvinnuni, ið dregur fólk til sín.

- Talið á fólki, sum nemur sær útbúgving, er eisini vaksið munandi seinastu árini, og hesi fólk leita sær tey størv, sum hóska til útbúgvingina, tey hava tikið.

- Ein stórur partur av hesum fólki kemur úr útjaðaranum, men vendir ongantíð heimaftur, hóast hann fegin vildi, tí ongi størv eru til hansara har.

### Nakað grundleggjandi galið

- Virksemið í Føroyum sær nú út til at vera komið í nøkurlunda fasta legu eftir kreppuárini, og fólkatalið er vaksið seinastu mánaðirnar, vísir Jóannes Eidesgaard á, men leggur tó dent á, at tilflytingin tó einamest er til Miðstaðarøkið.

- Tvøroyri hevur havt eina sera lítla tilflyting, sum ikki á nakran hátt er sambærilig við hana í Miðstaðarøkinum.

Men júst stóri lutfalsligi munurin er áhugaverdur: - At tilflytingin til Suðuroyar als ikki er lutfalsliga eins stór og til onnur stór øki í Føroyum er ein týðilig ábending um, at her er nakað grundleggjandi galið, sum vit eiga og mugu gera nakað við!

### Hvat er at gera?

Jóannes Eidesgaaard vísir á, at tað er ikki nóg mikið at styrkja høvuðsvinnuna, tí trupulleikarnir í útjaðaranum verða ikki loystir við henni.

- Við hesum er ikki sagt, at fiskivinnan ikki skal gerast meira lokkandi sum arbeiðspláss, tí tað er sanniliga neyðugt .

- Heldur ikki ein bøtan av samferðsluni er nøkur loysn, sjálvt um rættiliga nógvar ábøtur verða gjørdar á hesum øki, leggur Jóannes Eidesgaaard dent á.

- Tað, sum tørvur er á, er ein grundleggjandi broyting í hugburði: - At fáa fólk at síggja, at tað saktans ber til at fáast við umsiting og tænastuvinnu, sjálvt um ein ikki býr í Havn.

- Tí eigur at verða rikin ein politikkur, har tað tilvitað verður miðað móti, at har tað ber til, har eigur umsiting og tænastur at verða løgd uttan fyri Havnina. Ikki fyri at byggja upp dupulttænastur, men sjálvstøðugar eindir.

- Hetta skuldi borið væl til, tí vit hava í dag eina tøkniliga menning innan samskifti, at tú kann sita á Stóru Dímun og stýra heiminum.

### Ymisk størv í útjaðaranum

- Tað er sera týdningarmikið, at eitt øki sum Suðuroyggin hevur eina fólkasamanseting í størvum, sum er ein mynd av einum framkomnum samfelag, sigur Jóannes Eidesgaard.

- Við størstu virðing fyri okkara fiskivinnu, so er tað ikki eitt sunt tekin, um øll fólk bert tosa um fisk. Tú mást í vanligu bygdamyndini hava fiskimenn, flakavirkisfólk, útróðrarmenn, ófaklærd, lærarar, sjúkrasystrar, læknar, løgfrøðingar, verkfrøðingar, pedagogar, sosialráðgevarar, búskaparfrøðingar o.s.fr.

Jóannes Eidesgaard sigur, at tá ið hann tosar um at menna útjaðaran, so tosar hann ikki um bygdamenning ella smábygdamenning.

- Eg tosi um eina økismenning, soleiðis at skilja, at Suðuroyggin verður sædd sum eitt øki. Alt virksemið í oynni gagnar natúrliga øllum økinum og øllum bygdunum í økinum

- Hetta setir tað krav til okkum sjálvi, at vit lata restina av landinum vita og kenna, at vit arbeiða sum eitt øki. Togarí millum Tvøroyri og Vág ger Suðuroynna veika, bert samanhald í oynni gevur styrki, slær Jóannes Eidesgaard fæst.

### Hvørjar ítøkiligar ætlanir?

- Tá ið spurt verður um meira ítøkiligar ætlanir viðvíkjandi útjaðaranum, havi eg hug at vísa á ta semju, sum tykist vera millum tingmenn um at taka stig til at menna útjaðaran.

Jóannes Eidesgaard vísir á, at serliga tingmenn úr útjaðaranum hava sett sær fyri at umrøða málið í fullum álvara og at gera nakað ítøkiligt.

- Vit hava í fyrstu syftu roynt at fingið sjálvan trupulleikan og avleiðingarnar lýstar, og síðan er ætlanin at seta upp eina verkætlan fyri, hvussu vit kunnu broyta óhepnu gongdina.

- Sum kunnugt hevur Javnaðarflokkurin roynt at fingið eina politiska avgerð í Løgtinginum um, hvar oljuútgerðastøðin skal liggja; men hetta miseydnaðist tíverri, av tí at bert tríggir tinglimir uttan fyri Javnaðarflokkin atkvøddu fyri - nevnast kann, at hesir vóru tveir tjóðveldismenn og miðflokkamaðurin.

- Onnur mál fara at koma, sum kunnu vera við til at menna útjaðaran, og tey fara vit at viðgera til frama fyri hann, sigur Jóannes Eidesgaard, sum enn einaferð slær fast, at Javnaðarflokkurin raðfestir viðurskiftini hjá útjaðaranum sera høgt.

- Hann skoytir uppí, at tað eyðvitað hevði verið rætt, at eitt málsøki úti í landsstýrinum tók sær av útjaðaramálinum burturav.

- Men tíverri verða øll politisk og umsitingarlig orka í landinum í dag brúkt til fullveldisætlanina, so teir veruligu trupulleikarnir sleppa at liggja óloystir.

- Tað er tó gleðiligt at kunna staðfesta, at flest allir politikarar í dag duga at síggja trupulleikan viðvíkjandi útjaðaranum — eftir er bert spurningurin: - Hvat eigur at verða gjørt ítøkiliga? sigur Jóannes Eidesgaard at enda.

• Tað er týdningarmikið, at eitt øki sum Suðuroyggin hevur eina fólkasamanseting í størvum, sum er ein mynd av einum framkomnum samfelag.

• Tí eigur at verða rikin ein politikkur, sum tilvitandi leggur seg eftir at leggja umsiting og tænastur út um Havnina.

• Vit hava eina tøkniliga menning innan samskifti, at tú kann sita á Stóru Dímun og stýra heiminum




Konfirmatións-
klæðir til
hansara
fáast í
Kallkyn
Vágsbotnur - tlf. 31 62 06